Tórshavn, tann 26. januar 2021
20/00719-32

Upprit til Fíggjarmálaráðið

Til nr. 4 í LM-066/2020 - § 6 í avgjaldslógini – frá upprunavirði til útveganarvirði

Avbjóðingar við verandi skipan

1. Skjalafalsan

Ein bilinnflytari varð í mars 2017 dømdur fyri at hava snýtt landskassan fyri tkr. 760 fyri í 16 førum í 2015 at hava falsa skjøl um upprunavirðið á innfluttum brúktum bilum úr Týsklandi. Landskassin fekk allar pengarnar aftur.

Vandin fyri skjalafalsan er framvegis til staðar við verandi lóggávu og tað er sera trupult hjá Akstovuni at hava eftirlit við.

2. Kritikkur frá Landsgrannskoðanini av skjalprógvi fyri upprunavirðinum

Í frágreiðing síni í juni 2018 hevði LG framt eftirlit við, um akfør rinda rætt skrásetingargjald. 20 tilvildarliga útvaldar stakroyndir.
Í tí eini stakroyndini var talan um ein brúktan persónbil, sum varð innfluttur til Føroya.
Í hesum førinum kundi innflytarin ikki útvega skjalprógv fyri upprunavirðinum, og tí gjørdi Akstovan eina meting av virðinum, grundað á virðið á einum líknandi bili. LG kann ikki sannað, at Akstovan hevur mett upprunavirðið rætt. Stjórin kunnaði um, at tað er torført at meta um upprunavirðið á akførum, tí ofta er talan um dýrar bilar, sum annars ikki verða seldir í Føroyum, og tí er onki at samanbera við. Akstovan hevur havt samskifti við FMR um at broyta reglurnar, soleiðis at Akstovan sleppur undan at meta um upprunavirðið á henda hátt. **LG spurdi, um FMR ætlaði at broyta reglurnar um útrokning av skrásetingargjaldi av innfluttum brúktum akførum.**

3. Samanbering av virðisgjaldi av upprunavirði og av útveganarvirði

Í desember 2017 gjørdi Akstovan eina kanning av 28 tilvildarliga útvaldum innfluttum, brúktum persónbilum og vørubilum.

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

Kanningin vísti, at munurin á virðisgjaldinum til landskassan fyri hesar 28 bilarnar, sum var útroknað av útveganarvirðinum (niðurskrivaða virðinum uttanlands) í mun til útrokningina av upprunavirðinum (niðurskrivaða virðið í Føroyum), var tkr. 20 til fyrimuns fyri landskassan.

Við støði í hesi kanningini, bað Akstovan FMR um at broyta lógina til fyriliggjandi uppskot.

4. Trupult at útvega upprunavirðið

Ígjøgnum árini eru nógvar kærur komnar, bæði frá vanligum borgarum og teimum sum liva av at innflyta bilar um, at tað er ómøguligt at fáa til vega upprunavirðið á innfluttu, brúktu akførunum.

Í 2020 fekk Akstovan 3 váttanir um upprunavirðið á flytigóðsbilum frá einari bilasølu og higartil í ár hevur Akstovan fingið eina váttan frá eini aðrari bilasølu um upprunavirðið á einum flytigóðsbili.

Sum Akstovan upplivir tað, er tað ein veruleiki, at bilasølur eru afturhaldandi og drála við at lata viðskiftafólki, sum hava keypt ein innfluttan brúktan bil uttanlands upplýsingar um upprunavirðið, sjálvt um tey fáa 3.000 kr. fyri hvørja upplýsing.

Hetta hevur m.a. fört við sær, at okkurt bilverkstað, sum sá sær ein møguleika at vinna pening við at flyta inn brúktar bilar, er givin við hesum, tí tað er so trupult at umsita og trupult at áseta prísin til brúkaran.

Tí er tað Akstovan, sum má hjálpa viðskiftafólkunum úr knípuni og meta um upprunavirðið á bilinum við støði í einum líknandi bili í skipanini hjá Akstovuni . Hetta er ikki haldbart, tí eykaútgerðin í tí innflutta bilinum kann víkja munandi frá tí bilinum í skipanini, sum samanborið verður við.

Tað eru ikki øll, sum vilja góðtaka prísásetingina og er hetta ofta orsøk til misnøgd við metingina hjá Akstovuni og enntá kærur til Vinnukærunevndina um upprunavirðið.

Alt hetta gevur Akstovuni óneyðuga nógv arbeiði til eina uppgávu, sum kundi verið betur loyst, sbrt. fyriliggjandi uppskoti.

5. Øll bilamerkir ikki umboðað í Føroyum

Tað eru í hvussu er eini 20 bilmerkir, sum ikki hava nakran umboðsmann í Føroyum, sum fólk hava áhugað í at keypa sum brúktir bilar til Føroya.
Tað er ómøguligt hjá vanligum fólki at útvega upprunavirðið á hesum bilum og av tí at so fáir av hesum bilum verða skrásettir her, er møguleikarnir hjá Akstovuni at finna upprunavirðið í akfarsskránni eisini sera avmarkaðir.
Hevði keypsprísurin í staðin kunna verið brúktur til avgjaldsrokningina, hevði viðskiftafólkið frammanundan kunna rokna seg fram til ein endaligan kostprís fyri bilin.

Jákup Jacobsen, stjóri

AKSTOVAN